# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Køvandi Kringvarp ella fólksins tænari

Public service – ella almenn tænasta – hevur ofta verið nevnt í sambandi við Kringvarp Føroya – serliga tá røtt hevur verið um fíggjarligu umstøður stovnsins.

Nógv hava verið atfinningarsom, nú nýggja leiðslan hevur lagt skránna um – og fleiri hava skotið teimum í skógvarnar, at tey royna at kvala lítla kappingarneytan í Vágsbotni.

Hendingin í gjár, tá Kringvarpið út á seinnapartin broytti skránna fyri at senda frá fótbóltsdysti í Gøtu, ber tó av øllum. Rás2 varpaði fyri fyrstu ferð beinleiðis frá fótbóltsdysti sunnudagin – frá einum dysti, sum Kringvarpið hevði gjørt av ikki at senda frá. Tá Kringvarpið eisini hevði valt dystin í Gøtu í gjárkvøldið frá, so var upplagt hjá Rás2 eisini at senda hendan dystin.

Men nei. Hesum lat Kringvarpið sær ikki lynda, og almenni stovnurin kallaði tí eyka manning inn at senda frá dystinum. Aðrar sendingar, sum til dømis »Føroyskir sangir«, vórðu fluttar til klokkan 01 í nátt. Neyvan er tað hent áður!

Sjálvandi skal Rás2 ikki hava nakran einkarrætt til at senda fótbóltsdystir, eins lítið og Kringvarp Føroya skal hava tað, men tað tykir okkum tó løgið, at Kringvarpið tilvitað leggur sínar sendingar út yvir sendingar hjá Rás2. Ferskastu dømi um hetta eru ítróttarsendingarnar. Rás2 fór í fjør undir sendingina »3. hálvleikur«, sum byrjar tá Kringvarpið er liðugt at senda frá fótbólti sunnudag. Men hvat ger Kringvarpið? Jú, sjálvandi leingja tey sendingina »Bólturin«, so fólk ikki fara at lurta eftir Rás2.

Frammanundan hevur Kringvarpið lagt sendingina »Ctrl E« útyvir morgunsendingina hjá Rás2 og sendingarnar við Elis Poulsen út yvir Ynskiløtuna hjá Rás2.

Kringvarp Føroya er ein almennur stovnur í almennari tænastu. Hetta tykist leiðslan hava gloymt, og ger hon tí alt fyri at køva ta spírandi rásina í Vágsbotni.

Vit spyrja bara hví? Hvat er endamálið hjá Kringvarpi Føroya at uppføra seg á henda hátt? Er tað »almenn tænasta« at leggja sendiflatuna soleiðis til rættis, at fólk ikki skulu lurta eftir Rás2?

Vildi Kringvarpið tænt fólkinum – tikið lurtararnar fram um egnar indignatiónir, so átti stovnurin at tikið í hondina á lítlabeiggjanum Rás2, soleiðis at báðar útvarpsstøðirnar kundu lagt sendingarnar sum frægast til rættis soleiðis, at lurtarin fekk sum mest burturúr. Tá livdi leiðslan í Kringvarpinum upp til endamálið sum fólksins tænari.

**Sosialurin**

**Málið um Arctic Viking:**

## Munurin millum at byggja upp og bróta niður

ÓLI JACOBSEN



Nú um dagarnar tapti fiskimannafelagið eitt sakarmál móti reiðarínum hjá Arctic Viking.

Eg var vitni í málinum sum kunnugur í sáttmálaviðurskiftum hjá fiskimonnum. At vera vitni er ein lógásett skylda, og so fylgdi eg eisini boðunum frá dómaranum at siga satt.

Men nú hevur Jan Højgaard lagt á heimasíðina hjá FF ein stubba, at eg skal hava sátt iva um sáttmálan og harvið skatt sakina hjá FF. Sum vanligt hjá honum eru tað altíð onnur, sum hava skuldina fyri, at tað ikki gongst eftir vild.

Her er aftur eitt gott høvi at lýsa arbeiðsháttin hjá mínum eftirmanni.

Sjálvur brúkti eg nógvar kreftir at varðveita arbeiðspláss hjá fiskimonnum, og tað var ikki ikki minst galdandi í sokallaðu rækjunevndini. Tað eydnaðist eisini at varðveita trý av skipunum, og eru hesi í dag millum frægastu skip til inntøku.

Eitt av hesum var Artic Viking, sum við í síni manning hevði nakrar mans úr Litava frá tíðini, tá ið skipið var útflaggað. Í avrokningini vóru hesir menn taldir í manningartalinum.

Eftirfylgjandi vísir tað seg, at hesir litavar hava gjørt avtalu við reiðaríið um ein minni part enn ásett er í sáttmálanum.

Hetta er greitt í stríð við fortreytunum fyri sáttmálan, tá hann upprunaliga var gjørdur. Tí vildi tað verið prísverdugt, um FF tók neyðug stig til at tryggja litavunum sín sáttmálaásetta part, so tað ikki gjørdist munur á hýruni hjá manningini.

### Ikki rætt hond frá síðu fyri litavarnar

Men tað verður ikki gjørt. Lagt verður sak við kravi um, at litavarnir skuldu als ikki teljast við í manningina, tá býtt verður, tí teir ikki vóru mynstraðir.

Hetta er eitt krav, sum er fullkomiliga úr vón og viti. Tað kann ofta hava hent seg, at menn av eini ella aðrari orsøk ikki hava mynstrað, men fyri tað er tað ikki komið fyri í søguni, at partur ikki skal hava verið býttur til teirra. Tað avgerandi er, um menn hava verið manning á líka føti við hinar, og tað hava litavarnir verið. Tað er hetta sum liggur aftanfyri javnbýtishugtakið.

Um vit hugsað okkum til, at FF hevði fingið viðhald, og so skiparin bert mynstraði seg sjálvan, skuldi hann einsamallur havt allan partin hjá manningin + eykapartar! Tá kundi hýruprosentið løttliga farið upp um 100%. Bert hetta sigur nakað um tað "skil," sum liggur aftanfyri hesa sak.

Endamálið við sakini var ikki at hjálpa litavunum, men at føroyska manningin skuldi fáa tann partin, sum litavarnir høvdu verið við til at forvunnið. Hetta vildi skapt enn størri mun á hýruni hjá litavum og føroyingum!

Rætturin metti hetta eisini sum ein sáttmálaspurning, sum er púra rætt. Men eftir tvinnar samráðingar eftir, at hetta mál kom fram, sæst einki til, at roynt hevur verið at loysa hendan spurning.

Heldur enn samráðingar verður roynt at seta reiðaran, sum eisini er nevndarlimur í reiðarafelagnum, í ringt orð. Sjálvt eftir at reiðaríið er fríkent verður tað lagt undir sáttmála- og lógarbrot. Hetta minnir um hevnisøku sum hjá smádreingjum, sum hava tapt eitt slagsmál.

Við fakfelagsarbeiði skal ein duga at undirbyggja síni sjónarmið, og ein skal eisini hava hava virðing fyri sínum mótparti um nakað skal koma burtur úr. Eru ósemjur verða tær avgreiddar á ein skipaðan hátt.

Takkað verið hesum sakarmáli er opnað fyri, at tað nú ber til at taka útlendingar umborð fyri lægri løn. So "væl" hevur verið arbeitt!

### Neyðugt við trúvirði

Tað er óneyðugt at siga, at í sáttmála- sum í øðrum viðurskiftum er tað neyðugt at vera ein trúverdigur sáttmálapartur.

Kemur skip í flotan undir ávísum fortreytum, so má víðkomandi reiðari kunnað roknað við, at hesar ikki verða broyttar munandi, so grundarlagið fyri virkseminum verður fyribeint.

Men í fantasiverðini hjá Jan Højgaard eru øll, sum felagið hevur samskifti við, "skálkar." Hann dugur ikki at kenna mun á fantasi og veruleika, og tí er eisini so sera lítið hald í tí, sum hann førir fram. Júst málið um Næraberg lýsir trúvirðið hjá honum.

Her varð fyrst gjørdur ein sáttmáli. Tá so sáttmálin skuldu endurnýggjast krevur Jan Højgaard ein heilt annan sáttmála enn hann, sum var grundarlagið fyri, at skipið kom í flotan við 50% hækking í hýruni. Hetta kundi løttliga hava ta avleiðing, at fiskimenn mistu enn fleiri arbeiðspláss.

Fyri at FF ikki í hesum máli skuldi missa sítt trúvirði, tók stórur meiriluti av nevndini formannin av ræði og framlongdi tann galdandi sáttmálan.

Hann ger tá tað óhoyrda sum felagsformaður alment at leggja sínar egnu nevndarlimir undir at hava bakkað fyri trýsti hjá reiðaranum fyri at seta teir í ringt ljós, hóast teirra støða var ein sjálvsøgd avleiðing av fyrri støðuni eisini hjá Jan Højgaard í hesum máli.

Áhugin hjá Jan Højgaard fyri arbeiðsplássum hjá limunum er eingin. Hetta sást eisini, tá ið hann beinleiðis stuðlaði at beina fyri størsta arbeiðsplássinum hjá limum í FF, nevniliga Norrøna, frá dag til annan. Hetta er óhoyrt av einum fakfelagsformanni.

FF setti í síni tíð partapening í Smyril-Line júst við hesum endamáli at verja arbeiðsplássini.

Tað er í hesum ljósi Jan Højgaard skal síggjast, tá ið hann setur høvd á onnur í sáttmálaviðurskiftum.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.